# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Hvørt einstakt barn við menningartarni skal hava viðgerð, stuðul, hjálp og tryggleika 24 tímar um samdøgrið. Barnið tolir ikki skiftistíð!!*
*Finn í Puntabyrgi*

## Føroyingar í Grønlandi

Hugaligur lesnaður á Vinnusíðunum í blaðnum í gjár, har tað verður greitt frá, hvussu væl føroyingar og føroyskar fyritøkur klára seg í útlandinum. Í hesum førinum í Grønlandi.

Hetta fær uttan iva mong at minnast aftur á "gamlar" dagar, tá føroyingar í stórum tali róðu út í Grønlandi og eisini tá føroyingar vóru við til at byggja út undirstøðukervið í landinum.

At føroyskar fyritøkur nú aftur eru sjónligar í Grønlandi er gott. At vit kunnu vera við til at menna grønlendskt vinnulív og annars útvega okkum sjálvum arbeiði er nakað, sum vónandi kann fara at gagna øllum pørtum.

Talan er í hesum førinum um at skapa grundarlag fyri námsgrevstri í einum fyri føroyingar kendum stað, Fiskifjørðinum í Vesturgrønlandi. Fleiri føroyskar fyritøkur eru við í hesi verkætlan alt frá tekniborðinum til at byggja vegir, hús og kei.

Alt hetta kemur so heldur ikki av ongum. Tað var byggingin av Føroya Tele bygninginum í Hoyvík, sum skapti grundarlag fyri einum mennandi og professionellum samstarvi millum nakrar fyritøkur. Høvuðsfyritøkan er MT Højgaard, sum hevði hesa byggingina um hendi og sum síðani brúkti nógvar føroyskar fyritøkur sum undirveitarar. Við at brúka nýggja framferðar- og byggháttin "partnering" varð bygt upp ein nýggj ekspertisa og eitt professionelt álit og samstarv, sum síðani bleiv grundarlagið undir tí virksemi, sum nú fer fram í Grønlandi.

Har hevur MT Højgaard undir føryskari leiðslu varðveitt góða samstarvið við undirveitararnar frá Hoyvíksbyggingini, og í dag kunnu hesar fyritøkur so vísa fram enn eitt gott úrslit - eftir bert einum ári er eydnast at fullfíggja eina heldur óvanliga verkætlan: frá ongum at byggja út ein nám, gera vegir, arbeiðsskúrar, havn osfr. Og úrslitið er stórur útflutningur av mineralinum olivin, sum verður brúkt í stálframleiðslu. Eitt dømi, at føroyskar fyritøkur megna annað enn at fara í fisk, og at tær eisini eru kappingarførar í útlandinum. Spennandi verður at síggja, hvussu umrødda samstarv fer at seta enn fleiri ringar í vatnið.

**Sosialurin**

# Eru børn við brekið send aftur í tíðina?

FINN Í PUNTABYRGI



**Árið er 2006 - aftur hoyra vit Javna rópa varskó, tí foreldur umhugsa at flyta av landinum vegna tess, at barn teirra við breki ikki fær hjálp**

Tað var tann tíð, tá vit foreldur til børn við menningartarni og øðrum brekum fegnaðust yvir, at í Føroyum var gott at búgva. Her var lógarásett, at okkara barn skuldi fáa ta hjálp, tí tørvaði. Nú verður tað tann fíggjarliga støðan í landinum, ið skal avgera hjálpina og ikki tørvurin hjá tí einstaka heiminum. Fíggjarstøðan kann verða góð, men hvat, tá hon er verri????

Tá ið vit gomlu foreldur lesa og hoyra fjølmiðlarnar í hesum døgum, so sker tað ein í hjartað at hoyra neyðarrópini frá foreldrum.

Vit lesa og hoyra at foreldur eru ótrygg, tað er tann ringasta støða nakar kann koma í, og somuleiðis at heilsustøðan er í vanda bæði hjá børnum og foreldrum.

### Politikarir

Vit koma onga leið, um ymsu politikarnir nú fara at kasta eftir hvør øðrum í fjølmiðlunum. Tit eiga at taka foreldrini við upp á ráð, ja at seta tykkum niður at tosa við tey og heilsa upp á tað einstaka barnið.

Vit eru farin aftur í tíðina at avgreiða børn sum ein hópur. Heldur ikki eru tað so nógv børn, talan er um, at tit ikki eiga tíðina til tað.

Tað kann gleppa í einstøkum førum, varð sagt í Svf. Hetta kann ikki góðtakast.

Hvørt einstakt barn skal hava viðgerð, stuðul, hjálp og tryggleika 24 tímar um samdøgrið. Barnið tolir ikki skiftistíð!!

Mín áheitan og ynski er, at allir partar seta seg niður og tosa um framtíðina hjá tí einstaka barninum og heiminum.

Góði foreldur, missi ikki mótið!

# Samgongan í Tórshavnar býráð gongur í tvíningum

ANNIKA OLSEN
Býráðslimur fyri Fólkaflokkin



### Aftursvar til Hildur Eyðunsdóttir

Hildur Eyðunsdóttir hevur fingið eyguni upp fyri, at hon situr í skeivari samgongu við skeivari leiðslu. Hetta ásannar hon óbeinleiðis í grein í Sosialinum og Dimmalætting 26 juni, har stórmálið um umskipan av Vaglinum als ikki hevði verið umrøtt í samgonguni. Hetta sigur okkum eitt sindur um vánaliga arbeiðsstevið í samgonguni, har týdningarmikil mál als ikki verða viðgjørd, áðrenn tey koma á býráðsborð, men hinvegin trýst ígjøgnum. Verða kvinnurnar í samgonguni ikki eftirspurdar og tiknar við uppá ráð, áðrenn málini koma fyri í býráðið? Eg haldi, at tað er sera undrunarvert, at formaðurin í mentanarnevnd Tórshavnar Býráðs als ikki hevur verið við í viðgerðini av umskipanini av miðbýnum, men vaknar við kaldan dreym á býraðsfundi og tørvar - og fær hjálp frá hinum kvinnunum umframt tveimum fólkafloksmonnum í andstøðuni, so málið um umskipan av Vaglinum við stórum skrivustovubygningi, sum vildi oyðilagt hjartað í Havnini, bleiv felt.

Annars vil eg rósa Hildur Eyðunsdóttir fyri frálíkar intentiónir við miðbýnum, sum eg fult og heilt taki undir við. Góða Hildur um tú eina aðru ferð hevur tørv á at fáa hjálp frá okkum í Fólkaflokkinum, eru vit altíð til reiðar at stuðla skilagóðum uppskotum viðvíkjandi skipan av miðbýnum, har mentanin, tónleikurin og fólkið verður sett í hásæti. Skuldi tað hent seg, at tú hevur hug at saðla um, so eru vit í Fólkaflokkinum altíð til reiðar at finna loysnir um skipan av nýggjari samgongu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.